# At kenna sannleikan

Tann í Føroyum so væl dámdi leikstjórin Nils Malmros er aftur at finna í Føroyum við einum filmi. Hesaferð er hann ikki her, men filmurin "At kende sandheden" hjá honum verður so vístur í Havnar Bio.

Talan er um filmin At kende sandheden. Filmurin er ikki heilt nýggjur, men hetta ger kortini minni.

Filmurin snýr seg serliga um pápa Nils Malmros, Richard Malmros. Vit fylgja honum í fleiri pørtum av hansara lívi, men tað er serliga tíðarskeiðið sum neurokirurgir og yvirlækni á Århus Kommune Hospital, sum hann er vorðin víðagitin fyri.

Og reyði tráðurin í filminum snýr seg um eftirkanningar av arbeiðinum hjá honum í fjørutunum – við radioaktivum evni til røntgenmyndir. Hetta endar við einum rættarmáli, tá tað vísir seg, at fleiri sjúklingar hava fingið krabbamein seinni í lívinum.

Sum útgangspunkt er tað hetta, filmurin snýr seg um.

Men filmurin er so nógv meira. Filmurin hevur nógv løg, sum fylgir tær langt eftir, at tú hevur reist teg úr reyða stólinum.



Filmurin fylgir, hvussu ein serstøk menniskja lagna flættast inn við aðar. Filmurin er fiktión, men byggir á ávísar veruligar hendingar.

Og tey, ið dáma filmarnar hjá Nils Malmros ella góðar filmar yvirhøvur, kunnu trygt fara til hendan filmin.

Høvuðspersónurin Richard Malmros er ein genialur kirurgur, men ein ikki serliga góður pápi. Hann stríðist alt, hann eigur, fyri sínar sjúklingar, men stongir samstundis seg sjálvan alsamt meira inni frá umheiminum og gerst torførur at hava við at gera.

Stílurin er ótrúliga greiður uttan at gera ov nógv burturúr. Allur filmurin er í svørtum og hvítum, men litirnir mangla ikki. Søgan litar filmin frálíka væl.

Ì sínum stíli fær filmurin eisini eitt filosofiskt eyðkenni. Hann viðger grundleggjandi tilveru spurningar. Tí hvør vil ikki kenna sannleikan? Hvat er sannleikin?

Filmurin hyggur kritiskt eftir bæði fjølmiðlum og læknum, sum hvør í sínum lagi ikki kenna allan sannleikan.

At gera ein film um pápa sín er eisini rættiliga sermerkt. Hetta ger seg eisini galdandi í hesum filminum. Hvussu Nils Malmros upplivir pápa sína eiga vit mest at síggja við at leggja hendingarnar í filminum saman, men hetta er heldur ikki so lætt.

Teirra samband er tað mest undarliga av øllum í filminum. Og tað bara sum um, at tað vantar okkurt – vit mangla at kenna sannleikan.

Tað verður givin ein biti her og ein har, men samlaða myndin um teir báðar fæst ikki rættiliga upp á pláss.

Hetta er kortini ikki nakað, sum eigur at halda nøkrum afturi. Filmurin er frálíkur við einum góðum stíli, góða sjónleikarum og tematiseringum og abstratiónum, sum veruliga skara framúr.

Í eina tíð, har filmsmentan er amerikanskt Hollywood svans er tað svalandi og kveikjandi at síggja ein tílíkan film.

Danska filmslistin er á høgum støði. Og tað er stórt spell, at summi ikki kenna annað til danska mentan enn tílíkt humbuk sum Nick og Jay, ella hvat teir nú einaferð eita.

Havnar Bio eigur rós uppiborið fyri at seta hendan filmin á skránna, tí skapar ikki júst bíðirøðir við lúkuna.

Vit vóru bara nøkur heilt fá í salinum, og hetta er lítið annað enn stórt spell tí dygdirnar í hesum filminum eru so serstaka og sterkar.

Fyrst og fremst skal hesin filmurin síggjast, tí hann er knasandi góður. Talan er um reina filmslist. Lívið kann í stóran mun vera ein leitan eftir sannleikanum, og boðskapurin í hesum filminum er, at helst eingin veruliga veit, hvør sannleikin er. At kende sandheden kemur tær nógv meira enn filmar flest.

*Heri á Rógvi*

**Fakta um <At kende sandheden>**

**leikarar:** Jens Albinus, Lise Stegger, Birthe Neuman, Ida Dwinger o.o
**longd:** 100 min
**stað:** havnar bio, um tú ert 12 ár ella eldri

**Útvarpsmaðurin: Bjarni Mohr:**

# Alt er pliktir



**1. Heldur tú sjálvur, at tú ert húsligur?**
– Ja, tað haldi eg, at eg eri. Eg plagi at rudda og vaska upp av og á. Uppvaskið sleppur ikki at standa longi.

**2. Hvørja uppvaskisápu nýta tit heima, og hvussu vorðin er uppvaskibustin?**
– Vit nýta hasa har frá Kemilux, Sitrónuppvask, og uppvaskibustin er hvít og grá.

**3. Hvussu ofta gert tú mat um vikuna?**
– Tað man vera einar tvær ferðir um vikuna.

**4. Hvussu longi kókar tú eplir?**
– Tað er altíð 35 minuttir. Eg veit ikki, hví júst 35 minuttir, men tað fer altíð upp um hálvan tíma.

**5. Og egg?**
– Tað er nóg longi – einar 12 minuttir, tí bleyttkókað skal tað ikki verða. Tað leggi eg ikki so nógv í.

**6. Hvørja húsarhaldspliktt dámar tær minst at fáast við?**
– Vaska wc-ið. Tað geri eg faktiskt ongantíð.

**7. Og hvørja dámar tær so best?**
– Eg havi ongan favoritt, tí tað er jú alt meira ella minni pliktir. Og eg gleði meg ongantíð til at gera húsarhaldspliktir. Tær skulu bara gerast.

**8. Hvat borðreiðir tú við, tá tú hevur gjørt okkurt serstakliga leskiligt?**
– Tá er tað ræstur hálsur og eplir, og so øl og ein snaps afturvið. Tað er altíð gott.

**ítróttur**

Nr. 69 • mikudagur • 9. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi kundi verið bjargingarmaðurin

**FCK spælari duldi í sjónvarpssending mánakvøldið ikki fyri, at hann saknar Toda Jónsson, sum hann metir at vera ein tann besta álopsspælaran í Danmark**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Todi Jónsson sleppur framvegis ikki upp í part í FCK, men sambært FCK-verjuleikaranum, Bo Svensson, so er føroyingurin júst leikarin, ið kann lyfta FCK úr leikliga aldurdalinum, sum teir í løtuni eru í.*

Í kvøld bresta Brøndby og FCK aftur saman. Tey skulu á Brøndby stadion (og ikki í Parkini, sum vit søgdu í gjár), stríðast um pláss í hálvfinaluni í donsku steypakappingini. Roknað verður við, at áskoðaratalið fer at liggja um 20–25 túsund, so tað ber ikki til at siga annað, enn at tað er stórur áhugi fyri grannauppgerðunum í Keypmannahavn. Sunnudagin vóru fleiri enn fjøruti túsund og hugdi at landskappingardystinum millum FCK og Brøndby í Parkini.

Í donsku pressuni hevur verið gjørt nógv burturúr síðani javnleikin í Parkini sunnudagin. Mest hevur verið tosað um listan við skaddum FCK spælarum, sum sunnudagin gjørdist uppaftur longri. Tað er greitt, at miðvallarin Erik Mykland og vongverjin í vinstru, Peter Christiansen, ikki vera førir fyri at spæla. Umframt teir báðar eru fleiri aðrir FCK spælarar skaddir, eitt nú Thomas Røll og Christian Lønstrup, sum hava verið mettir at vera millum lyklaspælararnar.

**Leingist eftir Toda**

Lítið hevur leingi verið at hoyrt um Toda Jónsson, men mánakvøldið vísti ein av FCK spælarunum dirvi at taka til orðanna og siga, at Todi var nógv saknaður á FCK liðnum, og at tað avgjørt ikki hevði verið óhugsandi, at Todi Jónsson kundi verið spælarin, sum kundi kveikt lív aftur í FCK spælið.

Tað var Bo Svensson, sum í sendingini Det 'Bare Fodbold á rásini Viasport tók soleiðis til:

– Todi Jónsson er ein av bestu álopsspælarunum í superliguni. Hann kundi sum einki spælt í álopinum á øllum liðunum í superliguni. Eg sakni hann heilt nógv á liðnum hjá okkum. Spælið hjá okkum hevur ikki riggað í teimum trimum landskappingardystnum, sum vit hava spælt í vár. Um Todi hevði havt verið í FCK álopinum, so kundi hann við sínum skjótleika runnið í dýpdina og harvið verið við til at lyfta FCK úr leikliga aldudalinum, sum vit eru í.

Soleiðis tók liðfelagin hjá Toda Jónsson til, og einki er at ivast í, at eitt sovorðið alment herðaklapp fløvar hjá Toda, sum í vár verður rættuliga eyðmýktur av FCK leiðsluni, ið sektar seg sjálva við at halda Toda burtur frá liðnum, heldur enn at hava hann á liðnum og harvið økja um møguleikan fyri at fáa stigini, sum skulu til, um FCK skal varðveita fjarstøðuna til kappingarneytarnar og harvið vinna DM heitið.

Um opinskáraði FCK spælarin, Bo Svensson, fer at fáa bót frá leiðsluni í felagnum, tí hann hevur dittað sær at drigið Toda fram úr gloymskuni og hagar, sum hann hoyrir heima, sigur søgan einki um.

Todi hevur áður sagt, at hjá honum er einki annað at gera, enn at røkja skyldurnar, sum hann hevur sambært sáttmálan. Mánadagin var Todi og vandi saman við eykamonnunum hjá FCK. Teir, sum vóru á FCK liðnum í Parkini sunnudagin, fingu viðgerð, soleiðis at teir kunnu vera so væl fyri, sum tað ber til, tá ið FCK í kvøld fer á Brøndby stadion at spæla. Um Todi hesa ferð fór at fáa boð, var einki komið fram um, tá ið hesar reglurnar vórðu skrivaðar.

# GÍ møtir felagi úr Moldova

INTERTOTO CUP
*Páll Holm Johannesen*

Mánadagin var lutakastið til Intertoto Cup kappingina. Lutakastið var í sveisisiska býnum Nyon. GÍ er føroyska umboðið í kappingini í ár, og teir skulu møta einum felagið úr Moldova. Av tí landskappingin í Moldova ikki er avgreidd enn, er ikki avgjørt enn, hvat felagið verður. Fyrri dysturin verður í Moldova 21 ella 22 juni, og returdysturin verður í Føroyum eina viku seinni.

Skuldu tað eydnast gøtumonnum at vinna seg víðari í kappingini, so møta teir antin einum felagið úr Ísrael ella úr Albania.

# Holte tapti avgerandi dystin

**Bárður Mikkelsen og Holte møta nú Álborg í dysti um triðja plássið**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Sunnudagin var felagið hjá Bárða Mikkelsen á vitjan í Århus fyri leika avgerandi hálvfinaluna í bestu donsku flogbóltsdeildini. Dysturin gjørdist eitt satt vónbrót fyri Bárð og Holte, tí teir taptu sannførandi 3-0 fyri Skovbakken, og gjørdist tí ov stuttir til finaluna á hesum sinni.

Holte stóð seg væl í fyrsta sett, men settið glapp teimum av hondum, og Holte megnaði ikki at reisa seg aftur í dystinum. Ein stúgvandi full høll í Århus sá heimaliðið vinna 25-22, 25-21 og 25-17.

Skovbakken skal nú møta Odense í finaluni, meðan Holte má taka til takkar við at leika um triðja plássi ímóti Ålborg.